# Sløkkiliðsskeið í Vestmanna

**Í sambandi við at Vestmanna Sløkki- & Bjargingarlið hevur keypt ein stigabil frá Ikast kommunu, høvdu teir vitjan av tilbúgvingarleiðarum í Ikast-Brande kommune, og støðleiðaranum í Ikast, sum hildu skeið í nýtslu av bilinum**

TILBÚGVING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Vestmanna Sløkki- og Bjargingarlið keypti herfyri ein stigabil frá kommununi í Ikast í Danmark.

Talan er um ein Magirus Deutz við 256 hk V8 motori við automatiskum girum og 30 metra langum stiga við kurv til tveir mans.

Fyri at Vestmanna Sløkki- og Bjargingarlið skal kunna brúka bilin til fulnar, hava tveir mans, Niels Christensen, tilbúgvingarleiðari í Ikast-Brande kommunu, og Klaus V. Hebsgaard Falck, støðleiðari í Ikast-Brande kommunu, verið í Vestmanna og hildið skeið í nýtslu av bilinum og allari útgerðini, sum fylgdi við.

Bilurin hevur ljósmotor til tvær 1000 watt sólir, sum kunnu setast upp á stigan til at upplýsa eitt skaðastað. Tá stigin er heilt samanlagdur, kann hann eisini brúkast sum krani. Tá lyftir hann 3 tons, og kann m.a. verða brúktur til at flyta bilar av vegnum eftir ferðsluvanlukkur, ella at halda og lyfta við, tá fólk skulu klippast frí úr skaddum bilum. Eisini hevur hann eina børu, sum kann hangast upp undir stigan, sum síðani kann brúkast til at taka fólk upp av sjónum, ella tá bilar eru farnir útav vegnum.

Tilsamans vórðu gjørdir 200 slíkir bilar til brandstøðir í Týsklandi. Krøvini frá teimum vóru, at bilarnir skuldu vera lágir, smalir og stutt skuldi vera ímillum akslarnar og fyri at fáa minst møguligan vendiradius, soleiðis at teir skuldu sleppa lættliga inn og út úr teirra gomlu brandstøðum, eins og teir skuldu kunna koyra undir lágar brúgvar og vera lættir at koyra runt við í tætt bygdum øki.

Hetta ger bilarnar sera væl egnaðar til okkara brúk, sigur Fríðálvur Bláhamar, brunaumsjónarmaður hjá Vestmanna Sløkki- og Bjargingarliði, sum eisini nevnir at Peter Seloy, fyrrverandi brandmeistari í Tórshavnar kommunu, hevur hjálpt teimum sera væl í allari tilgongdini.



*Magirus Deutz stigabilurin við 256 hk V8 motori og 30 metra langum stiga*


*Vestmanna Sløkki- og Bjargingarlið saman við donsku skeiðleiðarunum.*
***Aftara rað f.v.:** Niels Christensen, tilbúgvingarleiðari í Ikast-Brande kommunu, Jóhan Jákup Vørmadal, Ólavur Winther, Fríðálvur Bláhamar, Marner Seloy, Ingdor Klein Olsen og Klaus V. Hebsgaard Falck, støðleiðari í Ikast-Brande kommunu.*
***Fremra rað f.v.:** Martin Hansen, Johnny J. Joensen, Rodmund Andreasen, Jákup Fonsdal, og Leif Klein. Í Vestmanna Sløkki- og Bjargingarliði eru 18 mans, har av teir 10 vóru á skeið*


*Stigin kann brúkast til fleiri ymisk endamál*


*Fólk hjá Vestmanna Sløkki- og Bjargingarliði læra at brúka bilin og útgerðina*

# Vestmenningar gita á Bryggjuni

Í longri tíð hevur pubbin Bryggjan í Vestmanna skipað fyri ymiskum tiltøkum, so sum sýning á stórskíggja tá enska fótbóltskappingin er í gongd, tunnudansi og av og á eisini spurnarkappingum. Næsta vikuskiftið verður kvinnukvøld.

Í annaðkvøld, leygarkvøldið 1. mars kl. 21, skipar Bryggjan aftur fyri spurnarkapping, men hesaferð er tað ein »firma spurnarkapping«, har 12 lið longu hava teknað seg til.

Liðini koma frá flakavirkinum, fiskivinnuskúlanum, barnagarðinum, kommununi og frá vanliga vinnulívinum. Á liðunum eru 5 leikarar, bæði kvinnur og menn – ung sum gomul.

Til vinnandi liðið er eitt ferðasteyp, og til hvønn einstakan á vinnandi liðnum er eisini eitt steyp.

Tá spurnarklappingarnar eru, koma vanliga eisini onnur enn bara liðini, sum kappast. Øll eru vælkomin at lurta ella at heppa sítt lið leygarkvøldið, siga fyrireikararnir á Bryggjuni í Vestmanna.

